# Málaraskaldið 100 ár

## – Tað ber til at hóma okkurt nýtt, bæði gott og ringt, tá verkini hjá einum gomlum málara verða savnað saman, sigur Kinna Poulsen m.a. í sínum ummæli av framsýningini Mikines 100 ár í Listaskálanum í Havn

KINNA POULSEN



LISTAFRAMSÝNING UMMÆLI

Tað kann næstan tykjast sum ein keðiligur óvani; hesin ovurhondshugur at nýta allar møguligar meira og minni týðandi føðingardagar sum páskot fyri at skipa fyri listaframsýningum í staðin fyri at sýna fram, tá listafólk ella kuratorar hava okkurt serligt listarligt uppá hjarta. Men tá nú sjálvur vegarin og faðirin at føroysku yrkismyndlistini, tann fyrsti føroyingurin, ið bæði gekk á kunstakademi og sum alt lívið livdi av og við myndlistini verður 100, so man bakstøðið sigast at vera í lagið hjá Listasavni Føroya at skipa fyri stóru føðingardagsframsýningini við verkum hjá Samuel Elias Joensen-Mikines (1906-79), sum er at síggja í Listaskálanum inntil Grækarismessu. Og hóast fyriskiparin, Helgi Fossádal í sínum úrvali tykist hava raðfest breidd og nøgd fram um góðsku, verður tilmælt øllum at gera sær sjálvum ta tænastu at vitja framsýningina og har uppliva málaraskaldið í øllum sínum fjølbroytni

### Stór framsýning

Verkini á framsýningini eru kanska ikki 100 í tali, men nærum. Eg taldi 97 verk og hetta var umframt fotomyndir, film og gomul málaraamboð hjá Mikines, ið eisini eru framsýnd saman við einari skitsubók. Tað er áhugavert at síggja, hvussu málarin hevur skrivað á pappírið hvønn lit, hann skal brúka hvar. Eitt lítið dømi uppá tað, sum Bárður Jákupsson nevnir í bók síni um Mikines og sum hann víðari lýsir við hugtakinum "málaraskald" um hetta, at Mikines skrivaði á og um sínar myndir til tess at minna seg sjálvan á litin og huglagið, hann vildi hava fram í myndini. Einastaðni hevur málarin t.d. tilskilað á skitsuna, at ein litur á luftini skal vera "líklittur". Um heimligu litirnar sigur hann: "*Enn nøkur orð um litirnar. Her í oyggjunum brótast teir á undurfullan hátt av vætuni í luftini, ið mangan spjaðir ljósið. Hetta havi eg upplivað, tá ið hav og himmal smelta saman í ljósareyðar og gráar tónar við glansi sum í kúvingsskel ella í ljósfossum, sum í veldigum veðurdrama knappliga kastast niður millum dimmar skýbólkar og lýsa á havið, klettarnar, tað grøna grasið og tey svørtu húsini. Í báðum førum er hetta sterkt, men samstundis mjúkt ljós. Tað er hugtakandi...*" (Bárður Jákupsson: Mikines, s.45). Dømið vísir hvussu væl Mikines dugdi at orða seg skaldsliga, men bendir eisini á hvussu tengdur hann var listarliga at føroysku náttúruni.

### Breiddin raðfest

Fyri atfinningarsama listaáskoðaran tykjast framsýndu myndirnar frá 1920´unum einamest sum eitt slag av kuriosum, sum vánaligar "áðrenn-myndir", eins og onkrar av teimum seinastu myndunum kanska heldur ikki áttu av verið við á framsýningini. Framsýningin hevði staðið sterkari, um bert tær góðu myndirnar vóru við. Hinvegin er tað sjálvandi undirhaldandi at uppliva breiddina, at síggja tær fyrstu royndirnar og fylgja menningini.

### Tematisk skipan

Framsýningin er skipað í evnisligum heildum soleiðis at skilja, at grindadráps- og dansimyndir hanga í einum av teimum høgu rúmunum, ið nevnist pyramida 1. Tær myrku deyðamyndirnar hanga har tær plaga í pyramidu 2, meðan gamli salur fyri tað mesta rúmar landslagsmyndum úr ymsum tíðarskeiðum. Tvey av teimum smærri rúmunum eru tikin í brúk og har hanga ávikavíst myndir av Bornholm og altartalvumyndir og skitsur. Sonevnda grafikkgongin inniheldur áðurnevndu ungdómsmyndir, nakrar framúr góðar portrettmyndir, ið kundu hingið betri, nakrar av teimum góðu myndunum av fólkum við havi, landslagsmyndir osfr. Hesin seinast nevndi parturin av framsýningini fevnir um verk frá 1927 fram til 1974 og er tann, ið er mest ørkymlandi og ymisligur bæði viðvíkjandi góðsku og stíli. Ynskið hjá framsýnaranum hevur bæði verið at fáa so nógv sum gjørligt við á framsýningina og samstundis hava eina lítla rest av teirri føstu framsýningini hangandi. Heildin hevði verið betri, eins og betur pláss hevði verið fyri teimum góðu myndunum, um t.d. allur Listaskálin varð tikin í brúk til slíkar stórar afturlítandi framsýningar. Leikluturin hjá listasøvnum er eyðvitað sera nógv broyttur í mun til fyrr, tá listasøvn svaraðu til teirra heiti og heilt einfalt vóru søvn av list, sum tú kundi koma at hyggja at. Í dag er sjálv formidlingsuppgávan hjá listasøvnum størri. Amtør-



*Ejnar Nielsen: Den blinde 1898*



*Perspektivið er yvirdrivið; fólkini tykjast øgiliga stór, meðan sluppirnar eru minkaðar niður í lítið og einki sum fyri at lýsa teirra lítilleika í mun til teirra vandamiklu og lagnutungu ferð*